


# Siri Vælvera – ein góð uppliving




Ein av handlunum í fremstu handilsgøtuni í høvuðsstaðnum er Siri Vælvera í Dr. Jakobsensgøtu, ið selur fyrstafloks undirklæði, skógvar, kompressiónssokkar, bróstprotesur, kostískoyti, vitaminir, húðrøkt o.l.

Siri Vælvera er í dag fremsti handil í landinum, tá tað snýr seg um dygdarundirklæði og lingeri í øllum støddum, framkomnar frítíðarskógvar, umframt eina rúgvu av vælveruvørum sum t.d. krem, vitaminir, oljur og ymiskan náttúrheilivág.

Eygleiðing, vegleiðing og ráðgeving eru lyklaorð í gerandisdegnum hjá starvsfólkunum í handlinum. Við hesum málsetningi gera tey sítt besta fyri at nøkta tørvin hjá teimum, ið vilja sær sjálvum og øðrum væl og sum tora at seta krøv til tað, sum tey vilja hava.

Siri Vælvera hevur eisini hollar royndir í øllum, sum hevur við bróstprotesur at gera, har allir kundar fáa persónliga viðgerð frá serkønum starvsfólkum.

Siri Vælvera hevur eina vælumtókta skipan, har kvinnur hava skrásett sínar BH og trussustøddir.

Í hesum jóladøgum er tað lætt at keypa gávur til tey, sum eru í skipanini. Til dømis um maðurin ynskir at keypa konuni undirklæðir í jólagávu, kemur hann bara inn í handilin og velur tey undirklæðir, sum hann heldur, at hon ynskir sær. Støddirnar eru at finna í skipanini.

Í handlinum er nakað fyri allar aldursbólkar. Um tað er til tey ungu ella talan er um eina gávu til ommuna ella abban sum t.d einar heitar hosur ella langar undirbuksur, so fæst tað í handlinum.




Hjá teimum sum ynskja at senda gávukort til ein av sínum nærmastu ella onnur ber eisini til at bíleggja gávukort online á heimasíðuni www.siri.fo

Hjá Siri Vælveru verður alt gjørt fyri, at kundin skal kenna seg væl, og at vitjanin skal verða ein góð uppliving. Har er hugnaligt inni, og kundin kann í friði og náðum hyggja seg um í hugnaliga umhvørvinum, eins og starvsfólkini altíð eru til reiðar við vegleiðing og ráðgeving.